Fyri 30 árum síðan:

# Rutuflogfarið fór út av flogbreytini í 1975

Tá Danair-rutuflogfarið úr Danmark skuldi lenda á flogvøllinum á Vágum 25. januar 1975 vildi so illa til, at flogfarið ikki fekk steðga vegna hálku á flogbreytini.

Flogskiparin varnaðist ikki, at breytin var hál, fyrr enn flogfarið nærkaðist endanum á flogbreytini.

Hann gjørdi tí av at snara í bakborð út av vøllinum og niðan í hagan. Flogfarið steðgaði einar 25 metrar frá breytini. Skaðin var so stórur, at flogfarið varð ikki sett í stand aftur.

Eingin mansskaði hendi av óhappinum.

Kelda: Myndaárbókin – *árið ið fór 1975*



Havnar leksikon:

# Færø Amts Sparekasse verður bygdur

*Mynd: Fornminnissavnið*

*Næstu ferð hava vit mynd av fyrsta biografinum í landinum "Føroya Bio", sum Andrias Niclasen (Dia Bø) læt upp í Tórsgøtu í 1910.*



Færø Amts Sparekasse um at verða liðugur. Í 1904 eru húsini liðugt bygd og byrjar Sparikassin sítt virksemi her í 1905.

Bygningurin hjá Færø Amts Sparekasse í Havn er um at vera liðugur. Arbeiðið byrjaði í 1903 og í 1904 var bygningurin liðugt bygdur.

Sparikassin byrjaði sítt virksemi í bygninginum fyri 100 árum síðan, í 1905.

Tað var Jákup Andr. Arge, vanliga nevndur Jampan (1854-1931), sum stóð fyri byggingini.

Vit síggja t.d. Løgtingshúsið, H.N. Jacobsens Bókahandil, Havnar Kirkju, Kommunuskúlan, Sproytuhúsið, Meinigheitshúsið, Skræddarahjørnið, (eftir skræddaranum Jóhs. Nolsøe). Tá so skræddarin miðskeiðis í 20-unum selur ognina í miðbýnum, og byggir sær hús í Hoydølum, fylgir skræddaranavnið við, og tey húsini fingu navnið "Skræddarahúsini".

Skræddarahjørnið í miðbýnum fekk síðan navnið "Det glade hjørne", av tí at tað var staðið, har ungdómurin í Havn møttist.

Tey, sum hava okkurt at viðmerkja í sambandi hesa myndina, eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen, ið savnar tilfar til Havnar leksikon, á telefon 314647 / 273168.